# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Minningarorð um
# Anju í Lambanum í Fuglafirði

**fødd 24. sept. 1976, deyð 20 des. 2009**

Meðan kavin lá hvítur um alt landið og jólatónleikur ljómaði víða um, bleiv Anja eftir stutta sjúkralegu tikin burtur einans 33 ára gomul, og Tollaksmessudag varð hon av stórari mannfjøld fylgd seinasta teinin her á fold.

Anja var dóttir Malenu og Steinbjørn í Lambanum í Fuglafirði, hon var elst og átti ein beiggja, Sandy, sum er 6 ár yngri.

Harrin Gud hevur myndað okkum øll, vit eru øll serstøk, hava øll okkara sereyðkenni og persónsmenskur. Tó kunna vit siga um Anju, at hon var framúr serstøk, hon var sum eingin annar.

Longu sum heilt lítil gjørdist Anja sjúk, hetta fekk hana tó ikki at halda seg aftur. Hon livdi og virkaði og vaks upp, og var til gleði í heimi sínum.

Tá ið Anja var liðug við barnaskúlan, fór hon á húsarhaldsskúla í Klaksvík, síðani hevur hon gjørt ymist, hon hevur verið á skúla í Noregi, arbeitt millum eldri og passað børn. Nú hon andaðist, arbeiddi hon á verkstaðnum Vón á Argjum.

Sum sagt var Anja nakað serligt, hon var sín egna Anja. Hon var so sera barngóð og dámdi so væl at vera um børn. Henni untist eisini at fáa eina lítla dóttur Svænhild Malenu, sum bert livdi fáar tímar. Hetta at Anja fekk eitt barn og gjørdist mamma fylti sera nógv í hennara lívi, og hon tosaði mangan um lítlu Svænhild Malenu.

Anja var so livandi, hon fylti nógv, har sum hon var, hennara smittandi látur, og hennara máti at siga tingini uppá vóru eisini hennara egnu. Vit, sum kendu Anju væl, vistu hvussu spontan, líkatil og impulsiv hon var, vit upplivdu hana glaða og spenta og so livandi.

Flestu, sum hava møtt Anju og fingið eitt prát við hana, minnast hana. Hon var ikki smæðin, hon himpraðist ikki við at heilsa uppá og hava onkra positiva viðmerking, líkamikið við hvønn tað skuldi vera.



Hennara lívstílur var ikki at fjeppast uppi í teimum, sum vit kalla tey vælbjargaðu í samfelagnum, tvørturímóti, Anja var ikki avmarkað í so máta, hon fevndi um alla breiddina, hon hálsfevndi øll, frá tí hægsta til tann lægsta. Hon gjørdi ikki mun á fólki, í hennara verð vóru øll líka, hon var bara, sum hon var, óhátíðarlig beint fram og ektað.

Serligan tokka hevði Anja til eldri fólk, henni dámdi so væl at vitja og tosa við tey gomlu, hon var so hjartalig og sýndi teimum serligan áhuga, og henni dámdi at gleða tey.

Vit lesa um Sakeus í Bíbliuni, maðurin sum var so lítil av vøkstri, at hann kleiv uppí eitt træ fyri at síggja, tá Jesus kom til býin. Anja var heldur ikki stór av vøkstri. Hon kleiv eisini uppí træið, og frá trænum sá hon verðina, hon sá allar vinklar av fjølbroytni lívsins, hon fekk eyga á Jesus og fylgdi Honum. Hon fekk eisini eyga á so mong onnur fyribrigdi, og hon fylgdi við, har lívið gekk fyri seg.

Hon var ein litríkur persónur bæði so og so, henni dámdi væl vakrar sterkar litir, henni dámdi væl stás og glitur, og hon smæddi seg ikki burtur, har hon ferðaðist.

Anja luttók, har hon kom framat, ringdi til útvarpið, sendi heilsur og valdi løg. Tosaði við fólk og var kend um alt landið. Hon var gávumild og stóð sjálv mangan eftir við ongum. Anja fevndi so víða.

Kensluborin, sum hon var, gleddist hon við teim glaðu, og græt við teim syrgjandi. Henni dámdi sera væl at syngja, og fáur man hava sungið í so mongum ymsum kórum sum hon, seinast hon sang var í Vesturkirkjuni nú til jóla.

Nú Anja sløknaði, arbeiddi hon á Verkstaðnum Vón, har dámdi henni frálíka væl, og tey á verkstaðnum vóru góð við hana. Sum vanligt til jóla skuldu tey geva starvsfólkunum jólagávur, men onkur helt tá fyri, at "Anja kann ikki fáa konfekteskju, sum hini, hon hevur sukursjúku. Skjótt blivu tey samd um, at Anja skuldi fáa ein eingil, tí sum tey søgdu: "Hon er ein eingil" So sigandi og vakurt, nú hon er vorðin ein eingil.

Anja búði á búðstovninum Stoffalág 64 í Havn. Hóast Anja ynskti sær egnan bústað, so dámdi henni væl har, og hevði hon altíð nógv gott at bera starvsfólkunum á heiminum, sum eisini vóru sera góð við Anju. Barnaheimið í Fuglafirði, var tó framvegis hennara. Tað var her hon var elskað treytaleyst og tikin ímóti við opnum ørmum og kærleika. Tit fylgdu við, hvussu hon hevði tað, og tann umsorgan og hjálp, ið tit veittu henni, var fyrimyndarlig. Við virðing hava vit sæð hvussu ómetaliga væl, tit hava megnað at verið nærverandi, tá Anja hevði brúk fyri tykkum. Tað var neyvan dagur, í øll tey ár Anja hevur verið heimanífrá, at mamman ikki ringdi og fylgdi við hvussu støðan var, og hetta dámdi Anju so væl. Kom okkurt í vegin, og Malena ikki var nóg skjót at ringja, so kom ofta sms frá Anju, sum ein lítil áminning. Tit dugdu so væl at møta henni, har hon var. Hon var ein so stórur partur av tykkum, og tað var hon takksom fyri. Hon fylti so nógv, og gjøgnum hesi mongu ár hava tit verið til reiðar fyri hana. Mangan hevur staðið á - hesuferð megnaði Anja ikki at koma fyri seg aftur, og tit merkja tómrúmið og saknin.

Anja var so góð við øll, og tí vóru øll so góð við hana. Hon hevði so mangar eginleikar og serligar gávur, sum vit kunna læra av og taka til okkum.

Nú hon er farin, saknað vit hana og minnast við takksemi hvussu kærleiksfult hon fevndi okkum.

Góða Malena, Steinbjørn, Sandy og Jana sum hava mist tykkara dóttur, systur og svigarinnu: vit hava samkenslu við tykkum, nú sorgin nívir. Mátti Harrin troysta tykkum í vitanini um, at Anja er farin til ein betri bústað, har eingin sorg, sjúka ella pína er longur.

Gud hevur tikið eina av Sínum vøkru blómum heim til Sín. Hann sá hana, har hon sat í mongdini klovin upp í eitt træ. Hann sá hana, sum Hann hevði myndað í móðurlívi, og Hann elskaði hana og vildi hava hana heim til Sín – heim í Himmalin, har rósan aldri følnar og bløman aldri doyr.

Friður verið yvir minninum um kæru bróðurdóttrina, Anju.

**Lillian**

## Andlát og jarðarferðir

**Mary Margreth Jacobsen, vanliga nevnd Pat**, gift við Klæmint Jacobsen, Tórshavn, andaðist í Newcastle Upon Tyne, sunnudagin, 90 ára gomul.

**Reynhold Nielsen, Tvøroyri**, andaðist á Ríkissjúkrahúsinum, mánadagin, 62 ára gamal. Bønarhald verður í Kristnastovu, Birmavej 36, Amager, týsdagin kl. 14. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

Listamaðurin **Hans Jacob Glerfoss, búsitandi í Hirtshals**, andaðist sunnudagin á Hjørring sjúkrahúsi, 72 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Malta í Hirtshals, mikudagin kl. 13. Tey ið ynskja at minnast Hans Jacob, kunnu lata Malta í Hirtshals eina peningagávu, konto í føroysku peningastovnunum.

**Fríðgerð Joensen** fer til gravar úr Svínoyar kirkju týsdagin kl. 12. Tey, ið vilja minnast Frígerð, kunnu lata Svínoyar kirkju eina peningagávu, konto í Noroya Sparikassa. Í sambandi við jarðarferðina siglir Silja Star úr Hvannasundi klokkan 10.30 og inn aftur kl. 15.00. Súlan siglir sum vanligt.

**Gretha Elsøe Dam á Argjum** andaðist á Lágargarði fríggjadagin, 88 ára gomul. Kistan fer av Lágargarði týskvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Kirjugarðskapellinum mikudagin kl. 13. Tey, íð vilja minnast Grethu, kunnu lata Handarustovu á Lágagarði eina peningagávu. Konta í peningastovnunum.

**Johannes Dahl Hovgaard, vanliga nevndur Johannes hjá Hassa**, ættaður úr Vági, búsitandi í Haderslev, andaðist hósdagin, 62 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Åstrup Kirke, Åstrup Allé 21 í Haderslev fríggjadagin kl. 11.

Vit kunngera fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður, pápi, svigarpápi, abbi og langabbi okkara

**Hans Jákup Glerfoss**
búsitandi í Hirtshals

andaðist á sjúkrahúsinum í Hjørring, sunnudagin 17. januar, 72 ára gamal.
Jarðarferðin verður frá Malta í Hirtshals, mikudagin kl. 13.00.

*Vegna familjuna*
**Dagmar**

Tey, sum ynskja at minnast Hans Jákup, kunnu lata eina gávu til Malta, konto í Norðoya Sparikassa.

## Dagurin

**19. januar. Pontianus.** Úr Spoleto í Italia. Doyði umleið ár 160 fyri trúgv sína. Gamli Knútur hertogi er eftir julianska kalendaranum sami sum nevndur er 7. januar. Kyndilsmessuknútur sipar til gamlar danskar veðurspádómar á hesum degi. Í Føroyum varð sagt: Sum veðrið er kyndilsmessuknút skal tað vera kyndilsmessu út.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*